# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Justinus Háskor 80 ár

Jóansøkudag 24. juni verður Justinus Háskor í Havn 80 ár.

Justinus er føddur úti í Svínoy í 1925. Foreldur hansara vóru Julia og Jóannes Frederiksen.

Í 1943 fluttu Justinus og familjan til Havnar at búgva. Justinus hevði ymiskt fyrifallandi arbeiði, var eitt tíðarskeið til skips og fór eitt skifti til Íslands at arbeiða á bóndagarði.

Afturkomin úr Íslandi arbeiddi hann hjá Peturi í Gong, byggimeistara, og bleiv hann har útlærdur sum húsasmiður.

Í 1952 giftist hann við Sonju Olsson, ættað av Tvøroyri og fingu tey børnini Sólrún og Jógvan. Justinus eigur 4 abbabørn og 4 langabbabørn.



Eitt skifti koyrdi Justinus hýruvogn í Havn.

Í 1985 var hann við til at starta P/F Polyplast saman við soninum.

Konuna misti hann longu í 1988, bert 56 ára gomul.

Justinus hevur tey síðstu árini havt stóra gleði av Tilhaldinum í Havn, har hann trúliga hevur møtt upp.

Tey ið ynskja at gleða Justinus á føðingardegnum eru vælkomin í Tilhaldið í Tórsgøtu fríggjadagin 24. juni millum kl.17.00-20.00.

# Sveinastykki á Hamlet

Á Erhvervsskolen Hamlet í Helsingør tóku fýra lærlingar sveinastykki í farnu viku

Teir fýra lærlingarnir hava staðið í læru í fýra ár, og eru avlærdir sum skibs- og bátabyggjarar. Lærlingarnir hjá AWI BOATS Service kunnu harumframt kalla seg plastbátasmiðir.

### Í Runavík og Vági

Tveir av lærlingunum eru útlærdir frá AWI BOATS Service, og teir eru: Oddur Klein, Saltangará og Margeir Danielsen, Toftir. Hinir báðir lærlingarnir eru avlærdir á Vágs Skipasmiðju og eru: Thomas Christensen, Vági og Kári Brattaberg, Vági.



*Myndin er tikin uttanfyri skúlan í Helsingør. Frá vinstru: Thomas Christensen, Kári Brattaberg, Oddur Klein og Margeir Danielsen*

*Mynd: Lasse Klein*

## Andlát og jarðarferðir

Harry Johansen, Lamba, andaðist mánadagin, 85 ára gamal. Farið verður úr Landssjúkrahúskapellinum mikudagin klokkan 16. Jarðarferðin verður úr Glyvra kirkju hósdagin klokkan 14. Sungið verður úr sálmabókini.

Kistan við Fridu Winther fór úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi týskvøldið klokkan 19. Jarðarferðin var úr Vágs kirkju mikudagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Fridu, kunnu lata Suðuroyar Elllis- og Røktarheimi eina peningagávu. Konto í peningastovnunum.

*Kelda: Útvarp Føroya*

Havnar leksikon:

# Sjúkrasystrar í 1943

Her er ein mynd av sjúkrasystrum á Dronning Alexandrines Hospitali í 1943. Spurningurin er um hetta eru sjúkrasystrar, sum hava fingið prógv í 1943, ella myndin er tikin av sjúkrasystrum sum arbeiddu á Dronning Alexandrines Hospitali hetta árið.

Um onkur av lesarum okkara veit meira um hesa myndina, ella kennir onkra av sjúkrasystrunum, eru hann ella hon vælkomin at seta seg í samband við Birgar Johannessen á tel. 214647 ella 314647.

*Mynd: Føroya Fornminnissavn*



## Dagurin

**23. juni. Paulinus,** deyður ár 431. Franskur munkur, sum gjørdist biskupur í Nola í Italiu, har hann doyði úti við 80 ára gamal.